Jákup Lindenskov, løgtingsmaður og valevni Javnaðarfloksins til fólkatingsvalið.



Undirgrundin á føroyskar hendur

— við samráðingum vil Javnaðarflokkurin broyta undirgrundarmálið

Við teirri stjórnarskipan vit fingu í 1948, fingu føroyingar størri ræði og frælsari stýrislag.

Enn hava vit ikki tikið við øllum teimum málsøkjum, sum stýrislagið gevur okkum og fyri at røkja øll áhugamál okkara so væl sum gjørligt, er tað ein avgjørd treyt, at vit lata okkum umboðað, har viðgerðirnar fara fram og avgerðirnar verða tiknar.

So leingi mál, sum viðvíkja okkum, verða viðgjørd í Fólkatinginum, er tað ein sjálvsagdur lutur at vit eru umboðað í Fólkatinginum, so vit kunnu gera vart við okkum og eisini ávirka viðgerðina til mesta gagn fyri land og fólk, soleiðis sum føroysk hugsan nú einaferð er.

Hesa støðuna hevur javnaðarflokkurin altíð havt.

Undirgrundarmálið

Á lista B í heimastýrislógini er nevnt undirgrundarmálið. Flestu B málini eru eftir samráðing yvirtikin uttan stórvegis trupulleikar. So kundi verðið við undirgrundarmálinum eisini, um henda yvirtøkan varð framd nóg tíðliga í heimastýrisskeiðnum. Gongdin í ráevnismálum hevur kortini vikað tann veruleika, at yvirtøkur altíð kundu fremjast, tá annar parturin ynskti hetta.

Tað at grønlendingar og danir hava gjørt semju um sonevnda ráevnisskipan, hevur leitt okkum inn í torføra samráðingar um at fremja løgtingssamtyktina at gera undirgrundar- og havbotnarmálið til sermál. Vit hava víst á, at samráðingarnar, sum framdar eru undir trimum teimum seinastu landsstýrunum, hava kortini vikað donsku mótstøðuna og mýkt málið munandi og er javnaðarflokkurin tí sannførdur um, at framhaldandi samráðingar verða at gera málsøkið til sermál. Tríggir av fýra samgonguflokkum halda at málið er so mikið á leið komið, at viðgerð av yvirtøkumálinum hond í hond við viðgerð av spurningunum um ta praktisku umsitingarskipanina, sum undirgrundini skal vera fyri, kemur at røkka á mál, og halda tí ikki at loysnin liggur í at tosa um at loysa frá Danmark ella fara út í heimin at leita sær stuðul til at knúska danir við.

Vit hava álit á okkara samráðingarevnum og evnum til at meta um eitt endaligt samráðingarúrslit, utta at halda, at vit fara at lata okkum trýsta frá einum sakligum vali, sum einans verður framt við føroyskum áhugamálum í huga. Tit minnast aftur til samráðingarnar við Felagsmarknaðin um upptøkutreytir í 1970-72 og minnast hvussu vit blivu undirdýkt við at **vilja lirka og lumpa Føroyar upp í Felagsmarknaðin**, tí vit søgdu, at vit skulu samráðast so leingi, at vit kendu endaligu upptøkutreytirnar og tá skuldu vit fremja eitt **føroyskt val**.

Lukkutíð megnaðu vit at vísa burtur tí trýsti, sum varð lagt á og kundu tí á sakligum grundarlagi vurdera, **at** treytirnar vóru ov vánaligar, **at** tann tørvandi fiskivinnupolitikkurin hjá EF ella tann fiskivinnupolitikkur, sum hómast kundi í framtíðini, ikki kom at gagna Føroyum, um vit valdu limaskap.

Í Ólavsøkuróðu løgmans varð boðað frá, at vit nú føroysku megin mugu kanna tær treytir, sum skulu galda fyri ráevnisumsiting, samstundis sum vit brynja okkum í telvingini um sjálva yvirtøkuna. Tá hetta arbeiði er gjørt, verður aftur farið undir samráðingar.

Vit eru sannførdir um, at hesar koma at røkka, men samstundis er tað alneyðugt at tað er javnaðarflokkurin, sum til dagin í dag er einasti flokkur, sum hevur sýnt hegni til at umsita heimastýrisskipanina og so við og við at útfylla hennara karmar og skipa ein útvikling, sum gevur tann føroyska avgerðarrætt, sum tíðin krevur, og at javnaðarflokkurin framvegis stendur á odda í hesum samráðingum.

Hesar samráðingar kunnu ikki latast flokki í hendi, sum bert **frystir fast** verandi skipan í einum stirvnum sambandspolitikki, men heldur ikki flokkum, sum ongantíð hava meint nakað við ríkisfelagsskapin, men altíð hava lúrt eftir møguleikum til at liða hann sundur í einum (geldum) sokallaðum sjálvstýrispolitikki, uttan nakrantíð sjálvir at hava megnað at seta veruligt frælsi ella veruligt sjálvstýri inn í heimastýrisskipanina ella karmin.

Bert tá hesir flokkar hava samvirkað við javnaðarflokkin, hava stig verið tikin til meiningsfyltar broytingar og útbyggingar í stýrisskipanini.

Bakkafrost og Fiskasølan:

Semja: býta rokningina millum sín

— Hinvegin er sakarmálið millum Kjølbro og Fiskasøluna tikið upp til dóms



Bakkafrost á Glyvrum og Fiskasølan eru vorðin samd í einari trætu, sum annars skuldi leggjast fyri Føroya rætt mánadagin.

Partarnir eru samdir um at býta millum sín sakarkravið, sum var slakar 140.000 kr.

Málið byrjaði í mai 1985, tá Fiskasølan sendi 8,1 tons av laksi til USA fyri Bakkafrost.

Men tá laksurin var komin yvir, slapp hann ikki inn í USA. Tí ongin váttan var frá landsdjóralæknanum.

Laksurin varð so fluttur heim aftur til Føroya, pakkaður umaftur og seldur til Vesturtýsklands — fyri lægri prís enn hann skuldi fáa í USA.

Tá avtornaði, var eftir at gjalda eina eykarokning upp á slakar 140.000 kr.: 37.000 kr. fyri vørugjald, farmagjald og trygging, 33.000 kr. fyri umpakking og 67.000 kr. í mistum søluvirði.

Og hvør skuldi gjalda?

Bakkafrost kravdi, Fiskasølan rindaði, tí hon átti at havt sæð til, øll loyvi vóru fingin.

Fiskasølan hinvegin segði, at Bakkafrost átti at havt síni viðurskifti í lagi, so øll fingust.

Gjørdu semju

Men Føroya rættur sleppur undan at avgera, hvør hevur meiri grein í sínum máli.

Tí partarnir eru nú vorðnir samdir um, at Fiskasølan rindar 70.000 kr. fyri flutning og umpakking og Bakkafrost ber mista søluvirðið, 67.000 kr.

Bakkafrost var skrásettur fiskaútflytari, tá laksurin fór til USA í mai 1985.

Men landsdjóralæknin hevði ikki sýnað virkið í langa tíð, so hann helt ikki, hann kundi skriva undir váttan, fyrr enn hann aftur hevði sýnað.

Tikið upp til dóms

Sakarmálið millum Kjølbro og Fiskasøluni er tikið upp til dóms, eftir at Kjølbro ikki vildi taka aftur stevningina.

Kjølbro hevur stevnt Fiskasøluni eftir umleið 500.000 kr., tí fyritøkan heldur, hon fekk ov lítið fyri saltupsaflak, Fiskasølan seldi.

Tá Føroya rættur hevði hoyrt partarnar, bað hann Kjølbro taka aftur málið, tí eftir hansara meting hevur Fiskasølan onki skeivt gjørt.

Men Kjølbro vil hava dóm.

hd